

Mouritz Mohr, stjóri á Pam Offshore Service. Mynd: Oljan.fo/Jan Muller

# Pam Offshore: Statoil-avtalurnar síggja spennandi út

**Jógvan Hugo Gardar**

15.12.2015 - 11:43

Oljan.fo

Fleiri føroyskar fyritøkur samráðast um at fáa avtalur í samband við stóra viðlíkahalds- og tillagingarpakkan sum bleiv almannakunngjørdur í morgun.

Statoil boðar í eini kunning til keypsskálan í morgun frá at avtalur eru gjørdar við fleiri fyritøkur um at gera ymisk viðlíkahalds- og tillagingararbeiði fyri norska oljurisan. Talan er um arbeiði komandi árini, úr seks upp í tíggju ár.

LES EISINI: Føroyingar njóta helst ágóðan av Statoil-viðlíkahaldi fyri 24 milliardir krónur

Hjá fleiri føroyskum fyritøkum, ið bjóða seg fram í oljuídnaðinum, vóru hetta sera jalig tíðindir, og eftir øllum at døma koma føroyingar at fáa partar av teimum uppgávunum sum nú eru avtalaðar.

- Hetta vóru góð og áhugaverd tíðindir, og eg vanti og vóni at vit fáa okkara part í hesum, sigur Mouritz Mohr, stjóri á Pam Offshore.

Hann sigur at Pam hevur rammuavtalur við fleiri av teimum fyritøkunum sum Statoil hevur gjørt avtalur við, og tað merkir at tey koma at bjóða fólk til tær uppgávurnar sum hesar hava brúk fyri.

- Eg veit ikki neyvt hvat hetta kemur at merkja fyri okkum, men vit hava havt gott samstarv við fleiri av hesum fyritøkunum, og eru gott kend við Statoil, sigur Mouritz Mohr.

Vit hava eisini vent okkum til aðrar føroyskar fyritøkur sum bjóða seg fram í norsku oljuvinnuni, og Statoil-avtalurnar koma væl við. Fleiri eru í samráðingum um avtalur knýttar til tað sum Statoil hevur lagt fram, men tær ynskja at bíða við at vátta hvørjar avtalur talan er um inntil undirskriftirnar eru uppá pláss. Tað eru komandi vikurnar og mánaðirnir sum koma at vísa hvørjar uppgávur føroysku veitararnir koma at fáa.